

*Gamli timburhandilin á Kambsdali er ein góður og sterkur bygningur, sum kann brúkast til ymisk endamál, sigur borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurd Simonsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Gamli timburhandilin á Kambsdali:

# Góður bygningur við ymiskum møguleikum

**Enn hevur Fuglafjarðar kommuna ikki tikið avgerð um, hvat gamli timburhandilin á Kambsdali skal brúkast til, nú kommunan eigur bygningin og teir umleið 12.000 fermetrarnar av lendi, sum eru uttan um. – Men møguleikarnir eru fleiri, sigur borgarstjórin, Sigurd Simonsen**

KAMBSDALUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið Fuglafjarðar kommuna yvirtók gamla timburhandilin á Kambsdali, sum P/F Havnar Timburhandil átti, hugsaði kommunan eitt nú um at brúka bygningin til meginbókasavn, sum undanfarna landsstýri ætlaði at seta á stovn. Ætlanin hjá táverandi landsstýri var nevniliga at skipa nøkur meginbókasøvn kring landið, sum skuldu verða høvuðsbókasøvn fyri hini bókasøvnini í økinum. Ætlanin var, at tvey slík bókasøvn skuldu verða í Eysturoy, og tí helt Fuglafjarðar kommuna, at tað kundi verið hóskandi við einum meginbókasavni á Kambsdali, har ríkt skúlaumhvørvi er framman-undan.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri, sigur, at kommunan hevði gevandi fundir við táverandi landsstýrismann, Annlis Bjarkhamar, um málið, men nú vit hava eitt annað landsstýri – og annan landsstýrismann í mentamálum, er ikki líkt til, at nakað spyrst burtur úr meginbókasøvnunum fyribils.

Borgarstjórin sigur seg tí ivast í, um nakað spyrst burtur úr hesum – í bræði.

Eingin avgerð

– Enn hava vit ikki gjørt av, hvat gamli timburhandilin skal brúkast til, men møguleikarnir eru fleiri – og tankarnir nógvir. Hetta er ein stórur og góður bygningur. Hann er einar 800 fermetrar stórur, stoyptur upp í skjøldrarnar og klæddur. Í niðara parti er loft í erva, og har er køkur og fundarhøli. Góð parkeringsviðurskifti eru eisini á økinum.

Hann vísir á, at P/F Havnar Timburhandil, sum hevur bygt stóran bygning á ídnaðarøkinum á Kambsdali, framvegis leigar ovara helming av gamla timburhandlinum, eitt nú til timburmenn, sum húsast her, meðan teir smíða sperrur og annað.



*- Nú eigur Fuglafjarðar kommuna allan Kambsdal, sigur borgarstjórin, Sigurd Simonsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Men nú er hetta eitt leigumál, sum kann sigast upp eftir stuttari tíð. Sostatt kann bygningurin verða tøkur, tá ið vit hava tikið endaliga avgerð um, hvat vit skulu brúka hann til.

### Fleiri møguleikar

Sigurd sigur, at aðrir møguleikar, sum eisini hava verið nevndir, eru at brúka bygningin á Kambsdali til skúlaheim – ella heim til gomul.

– Ein kanning vísir, at millum skúlanæmingarnar á Kambsdali, kundi ein triðingur hugsað sær at búð uppat skúlanum.

Hann sigur, at kommunan í fyrstu syfti kundi hugsað sær eitt næmingaheim á Kambsdali til einar 40 næmingar.

Sum skilst, fer Fuglafjarðar kommuna undir øllum umstøðum at arbeiða við einum skúlaheimi á Kambsdali.

- Tíðin fer at vísa, hvat vit fara at brúka gamla timburhandilin á Kambsdali til, men greitt er, at bygningurin er so mikið góður, at hann verður ikki rivin niður, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri, sum at enda leggur aftrat, at Fuglafjarðar kommuna við keypinum av gamla snikkaravirkinum nú eigur allan Kambsdal.

Vølvuspá í Norðurlandahúsinum:

# Ein heimur verður til av eldi og ísi

**Í sambandi við tiltakið, World Story Telling Day - Altjóða frásøgudagin, sum verður í Norðurlandahúsinum, 18. mars, verður leikurin, Vølvuspá, framførdur í Klingruni dagin eftir**

LEIKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Katrine Faber úr Danmark er í hesum døgum í Føroyum í samband við, at hon 11.-13. mars fer at halda workshop saman við tónleikaterapeutinum, Sanne Storm, sum býr í Havn. Við sær til Føroya hevur hon Aksel Striim, sum í samband við ferðina fer at hava "knoglefløjtekursus". Um hetta tiltakið fæst meira at vita hjá Sanne Storm, sum er at hitta á telefon 273826.

Tað er í hesum sambandi, at tiltakið, Vølvens Spådom - ella Vølvuspá, er á skránni í Klingruni í Norðurlandahúsinum, komandi leygardag, 19. mars.

### Um leikin

Tað er Akkamaka Duo, sum í leikinum sigur frá søguni um, hvussu heimurin varð til av eldi og ísi. Um tann lýsandi gudin, Baldur, sum varð tikin av døgnum av listum Loka - og um, hvussu gudarnir royndu at fáa hann aftur frá helheimi til heimim hjá teimum livandi. Ein sokallað lýsandi søga í myrkri!

Norðurlandahúsið veit at siga, at leikurin tekur útgangsstøði í spádóminum hjá Vølvuni, tí gamla Edda-kvæðnum, sum er eitt tað elsta og sterkasta kvæðið, vit hava í norðurlendskari mytologi.

Hetta er ein áminning um, hvussu heimurin varð til, og samstundis ein forsøgn av ragnaroki - heimsins enda, har nýtt lív vil vera til.

Ein ávaring um, hvussu heimurin kann missa sína javnvág.

Akkamaka Duo endurnýggjar tann aldargamla frásøguháttin í tøttum sambandi við áhoyrarar og sigur frá í samspæli við tónleikin og sangin - á sama hátt, sum fólk í øllum heimsins mentanum hava gjørt síðan tíðarinnar morgun.

Leikurin - Vølvuspá - verður sum nevnt í Klingruni í Norðurlandahúsinum, leygardagin, 19. mars. Hann er ætlaður vaksnum og børnum úr 7 ára aldri.

Kostnaður á atgongumerkjum er 70 krónur fyri vaksin og 40 krónur fyri børn.



*Tað er Akkamaka Duo, sum í leikinum Vølvuspá eitt nú sigur frá søguni um, hvussu heimurin varð til av eldi og ísi*

Sosialurin
www.sosialurin.fo